# Jólaoratorium eftir J.S. Bach

JÓLAORATORIIÐ
*Ólavur Hátún*

Eins og Händels Messias er Jólaoratoriið ein gleðiljómur frá byrjan til enda. Tað, sum ivaleyst ger sítt til, at hesin tónleikur helst meira enn nakað tónaverk eftir J.S.Bach fellur fólki væl í oyru, er tann veruleiki, at Bach í stóran mun nýtir aftur tónleik, sum hann frammanundan hevur havt góða eydnu við til serlig hátíðarhøvi eitt nú til føðingardag hjá drottninginni ella í øðrum fúrstaligum samkomuføri. Hetta kemur serliga til sjóndar í byrjanarkórunum til 1., 3. og 5. part av verkinum.

Vegna sítt djúpt religiøsa sinnalag og sínar sannførandi musikalsku lýsingar av bíbliuhendingunum og tí kristliga boðskapinum hevur Bach fingið heitið "Tann fimti evangelisturin". Hjá honum er her tí ikki talan um lættvunna endurnýtslu av nøkrum, hann hevur liggjandi, heldur lyftir hann tónleik frá fyrr upp í enn sublimari hæddir, nú tekstliga innihaldið er sjálvur jólaboðskapurin. Hann, sum við øll síni størru skaparnarverk setti merkisorðini "Soli Deo gloria" t.e. Harranum eina heiðurin, gjørdi ikki tann stóra skilnað millum tað kristiliga og tað verðsliga her á fold. Tí sakaði tað honum onki, at tú í hesum lovsongi til tað himmalska eisini kundi hóma dansikenda fagnaðarrómin í teim fúrstaligu samkomuhallunum.

Í hesum umfatandi tónaverki er ikki einans talan um ovfarakæti, men eisini um stillførar løtur, har kirkjufólkið gjøgnum kórið gevur til kennar sína luttøku og sítt inniliga takksemi fyri gleðiboðskapin. Hugtakandi eru vøgguljóð fyri lítla barninum á krubbustrá - tónleikur sum lutvís eisini hevur sín uppruna í verðsligum høpi.

Í eisini rurandi inngangjnum til 2. part, har hirðarnir savnast um nýfødda kongasonin, vísir Bach av sonnum sítt instrumentala tónakynstur, har tú í skifti millum strúkarar og blásarar fært kenslu av veingjasuði og gleðiboðum av himli og fagnandi svari aftur frá hirðunum á markini, og har øll ljóðførini at enda fylkjast í felags lovsangi - sanniliga ein satsur, ið valla finnur sín líka í allari tónleikasøguni.



Jólaoratoriið er tó ikki eitt oratorium í vanligari merking, hóast Bach sjálvur brúkti tað heitið. Eitt oratorium er at lýsa sum eitt drama í orðum og tónum - men uttan leik og íklæðing sum í opera -, sum greiðir frá einstakari bíbilskari hending. Men í Jólaoratoriinum er talan um seks sjálvstøðugar kantatur skrivaðar til hvønn av kirkjudøgunum um jólahalguna, sum tó við sínum tekstliga innihaldi um jólabodskapin mynda eina listarliga heild. Partarnir eru hesir:

Fyrsti jóladagur: Kristi føðing
Annar jóladagur: Eingilin boðar hirðunum frá
Triði jóladagur (sum tá var halgidagur): Hirðarnir tilbiðja barnið í krubbuni
Nýggjársdagur: Jesus verður doyptur
Sunnudagur eftir nýggjár: Teir tríggir vísmenninir vitja Heródes
Trettandadagur: Vísmenninir vitja og tilbiðja nýfødda kongasonin.

Havnarkórið við solistum og orkestri framførir, sum vanlig siðvenja nú er, bara partarnar 1-3 - tó við ískoyti av tveimum arium úr fjórða parti og endandi við tí fagnaðarmikla "Ehre sei Gott", sum er fyrsta kór úr 5. parti.

## Solistar í Jólaoratoriinum

**Jonas Fosdal** tók diplomprógv í sangi á Det Kongelige Danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn seinasta summar. Høvuðslærarar hansara har vóru Keld Thaarup og Bodil Øland.

Samstundis hevði hann frammíhjá fingið undirvísing hjá gitnum sanglærarum sum Anthony Rolfe-Jonson og Dorothy Irving. Famhaldandi fær hann nú sangútbúgving í London hjá Roger Vignoles og Robert Tear.

Jonas hevur serliga lagt seg eftir at syngja lieder og solopartar í oraorium, og ungur, sum hann er, hevur hann longu havt hópin av framførslum í slíkum sambandi m.a. sum evangelistur í Jólaoratorium og Jóhannnespassión J.S. Bachs og sum solistur í Händels Messias og Skapaninin eftir Joseph Haydn. Harumframt er hann eisini limur í operukvartettini Opera Sublima.

**BergÞór Pálsson** leyk B.M og Master´s Degree of Voice frá Inidiana University í USA í 1987., har hansara høvuðslærarar vóru Roy Samuelsen, Nocola Rossi-Lemeni og Virginia Zeani.

Síðan starvaðist hann í trý ár á Pfalztheater í Kaiserslautern í Týsklandi, har hann var solistur í gitnum operum og m.a. hevði høvuðsleiklutin í Don Giovanni eftir Mozart.

Síðan 1991 hevur hann havt tætt tilknýti til íslendsku operuna og havt týðandi leiklutir í operum eftir Mozart, Verdi, Puccini, m.a. tittul leiklutin í "Eugene Onagin" eftir Tjaikovski.

Eisini hevur BergÞór mangan verið sangsolistur hjá íslendska symfoniorkestrinum eitt nú í Carmina Burana hjá Carl Orff.

Sum oratoriisangari hevur BergÞór Pálsson afturvendandi luttikið t.d. í Requiem Mozarts, Skapanini eftir Haydn og í passiónum og oratorium J.S.Bachs - soleiðis var hann eisini bass-solistur, tá Havnarkórið fyri tveimum árum síðan framførdi Jólaoratoriið.

## Berghild Poulsen og Elsa Súsanna Dalsgaard



*Elsa Súsanna Dalsgaard*



*Berghild Poulsen*

Berghild Poulsen hevur læraraprógv frá Føroya Læraraskúla við tónleiki sum linjugrein. Tíðliga gav hon til sjóndar sínar sertøku songgávur. Hon hevur sungið nógv í kóri og tey seinastu mongu árini í Havnarkórinum. Í hesum umhvørvi kom hon í samband við úrvaldar sanglærarar sum André Orlowitz úr Póllandi og gitnu íslendsku operusangarinnuna Ólöf Kolbrún Harðardóttir. Í kórsins framførslum av størri verkum sum t.d. Skapanini eftir Haydn, Händels Messias og Ein deutsches Requiem eftir Johs. Brahms hevur Berghild Poulsen við sínari ljómandi, kenslubornu rødd ikki smæst burtur undir liðini á úrvaldum solistum uttan úr heimi.

Ofta eru boð eftir Berghild til solouppgávur hjá øðrum ljómliðum eisini, og eitt serligt tilknýti hevur hon havt til Tórshavnar Kamartrio.

Elsa Súsanna Dalsgaard tók diplomprógv í sangi á Det kgl. danske Musikkonservatorium í Keypmannahavn. Sanglærarar hennara vóru John Gutman og Anne Nyborg.

Í Danmark starvaðist hon sum professionellur sangari í Radiokoret, Det kgl. Operakor og í Jysk Operakor. Síðan 2000 hevur hon havt fast starv í Den norske Operas Kor í Oslo.

Elsa Súsanna hevur havt solokonsertir ymsa staðni í Danmark, og hennara ljómandi rødd hevur eisini verið at hoyra á solokonsertum í Føroyum eitt nú í sambandi við Summartónar. Tá Havnarkórið til sínar oratoriiframførslur hevur havt tørv á alt-sangara, hevur tað verið sum ein sjálvfylgja at heita á Elsu Súsonnu – soleiðis eisini til framførsluna av Händels Messias fyri seinastu jól.

Í komandi starvsári skal Elsa Súsanna Dalsgaard verða solistur í operunum Rigoletto og La Traviata eftir Verdi á Den norske Opera.




# Søkt verður eftir deildarstjórum
## til Føroya Tele

**Fjarskifti og kunningartøkni mennast alsamt skjótari um allan heim, og tann týdningur, sum hetta hevur fyri búskapin í einstøku londunum, gerst alsamt størri. Hugtøkini "nýggjur búskapur", vøkstur og framburður verða beinleiðis tengd at kunningartøkniliga støðinum í landinum. Týdningurin av nýggju búskaparligu menningini er ikki minni í Føroyum enn aðrastaðni, heldur hinvegin.**

**Føroya Tele hevur sum aðalendamál, at føroyingar skulu kunna gangnýta menningina á fjarskiftisøkinum á best møguligan hátt. Hetta setir stór krøv til Føroya Tele, sum er ein av størstu fyritøkum í Føroyum.**

### Stjóri á Teknisku deild

*"Forðingar er tað, vit síggja, tá ið vit taka eygini frá málinum"*
Henry Ford

Fyri tekniska stjóra okkara, sum søkir sær nýggjar avbjóðingar, verður søkt eftir nýggjum tekniskum stjóra. Umframt at vera stjóri á Teknisku deild myndar tekniskur stjórin leiðslubólkin á Føroya Tele saman við fíggjarstjóranum, marknaðarstjóranum og stjóranum fyri nýstovnaðu deildini Virkismenning.

**Tekniska deild er í dag skipað við hesum undirdeildum:**
· Radiodeild
· Støðardeild
· Transmissióndeild
· Kaðaldeild
· Byggideild
· Planlegging og samskipan (stápar)
· Installatión
· IP-Net
· tey 6 FT-økini uttanfyri Suðurstreym

Tilsamans telur deildin 130 fólk.

Uppgávan hjá teknisku deild fevnir um rakstur, nýgerð planlegging, dokumentatión og samskipan innan støðar-, fartelefon-, radio-, beinara-, kaðal-, og transmissiónskipanum, herundir eisini uttanlandasambandið við Cantat 3, Farice, og fylgisveinasamskiftið.
Umframt hetta hoyrir rakstur og nýgerð av bygningum eisini til deildina.

**Ábyrgdin hjá tekniska stjóranum verður, umframt omanfyri standandi:**
· at luttaka í altjóða samstarvi við aðrar veitarar
· at síggja til at nýggj tøkni og nýggjar tænastur verða skipaðar á skynsamiligan hátt
· at samskipa deildirnar til at virka operativt sum ein eind
· at síggja til, at starvsfólkið hevur neyðugu førleikarnar at røkja uppgávurnar
· saman við leiðslubólkinum og starvsfólki annars, at leggja tøkniligu strategiina fyri Føroya Tele
· at rakstar-, íløgu- og tíðarætlanir halda.

Umráðandi er, at tann, ið sett/-ur verður, hevur hollan kunnleika til fjarskiftistøkni.

Útbúgving: Ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni sum t.d. verkfrøðingur ella líknandi.

Løn sambært avtalu.

### Stjóri á Virkismenning

*"Um framtíðina er at siga, at tú skalt ikki síggja hana, men gera hana møguliga"*
Antoine de Saint-Exupéry

Føroya Tele hevur í skjótt 100 ár verið einasti útbjóðarin av fjarskifti í Føroyum. Í einum nútímans samfelag er ikki ynskiligt við monopolstøðu, líkari tí, sum Føroya Tele (áður TFL) hevur havt, og vit bjóða tí eisini okkara kappingarneytum vælkomnir á marknaðin.
Hinvegin merkir henda gongdin, at Føroya Tele ynskir at taka upp nýggj virkisøki fyri teir marknaðarpartar, sum náturliga verða minni. Vit mugu tí venda okkum til aðrar marknaðir og í flestu førum vil tað siga, at velta upp úr nýggjum. Sum dømi kann nevnast Televarpið.
Virkismenning hevur í skjótt tvey ár verið stápsfunktión undir stjórnaum, men tørvur er nú á, at deildin verður sjálvstøðug linja.
Á deildini arbeiða í løtuni 4 fólk.

Týdningurin av nýggju linjuni verður undirstrikaður av, at upprættað verður nýtt deildarstjórastarv í virkismenning. Nýggi deildarstjórin verður partur av dagligu leiðsluni í Føroya Tele saman við forstjóranum, fíggjarstjóranum, marknaðarstjóranum og tekniska stjóranum.

**Ábyrgdin hjá nýggja stjóranum verður**
· at menna deildina í mun til tey rák og ábendingar um nýggjar virkismøguleikar, sum kunnu vera áhugaverdir fyri Føroya Tele
· at velja røttu starvsfólkini og síggja til, at tey hava neyðugu førleikarnar at røkja teirra uppgávur
· saman við leiðslubólkinum og starvsfólki, at leggja strategiir fyri framtíðar virkisøki hjá Føroya Tele
· at rakstar-, íløgu- og tíðarætanir halda.

Umráðandi er, at tann, ið sett/-ur verður, hevur hollar royndir umframt viðkomandi útbúgving.

Løn sambært avtalu.

### Umráðandi fyri Føroya Tele er, at tey, ið sett verða:

· hava góð samstarvsevni og áhuga fyri trivnaði starvsfólksins
· hava leiðsluroyndir frá líknandi størvum innan tað almenna ella innan privata vinnulívið
· vilja taka stundum stórar avbjóðingar til sín
· duga at geva frá sær uppgávur og eggja øðrum til at taka við avbjóðingum
· hava hollan kunnleika til KT
· hava royndir í at arbeiða í altjóða umhvørvi
· duga enskt og skandinaviskt á samráðingarstigi
· trívast í einum umhvørvi, sum broytist frá degi til dags
· hava áræði og eru ágrýtin

Meira fæst at vita um størvini frá Andrasi Róin, stjóra, á tlf. 303030

Umsøknir við avritum av viðmælum og prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. desember 2002 kl. 12.00.

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn



Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýri eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*